14. november 2025
Journalnr. 25/30647

# VIÐMERKINGAR TIL UPPSKOT TIL LØGTINGSLÓG UM SUÐUROYARTUNNILIN VIÐ TILHOYRANDI TUNNILSKERVUM OG VEGAKERVUM

Landsverk vil við hesum viðmerkja uppskotið til Løgtingslóg um Suðuroyartunnilin, ið Løgmansskrivstovan hevur sent í hoyring. Sum myndugleiki skal Landsverk góðkenna verkætlanina um Suðuroyartunnilin. Viðmerkingarnar til fyriliggjandi lógaruppskot eru tí gjørdar fyri at varpa ljós á týdningarmikil ivamál og fyri at tryggja, at verkætlanin verður lýst við fullum fakligum grundarlagið.

Uppskotið líkist í stóran mun fyrra lógaruppskotinum (LM-072/2024), har Landsverk sendi inn hoyringsskriv, ið er Fylgiskjal 44 til lógaruppskotið. Av tí at lógaruppskotini eru rættuliga eins, er fyrra hoyringsskrivið framvegis viðkomandi, og verður tískil viðlagt hesum skrivinum.

Niðanfyri verða nøkur av somu evnunum viðmerkt aftur, harímillum linjuføringar og kostnaðarmetingar, myndugleikauppgávan og viðurskifti í sambandi við fyrireikingararbeiði, umframt hvat er hent síðani lógaruppskotið var til viðgerðar í vár.

## Meting av linjuføringum og kostnaðarmetingum

Tað eru serliga tvær linjuføringar, ið hava verið frammi viðvíkjandi tunlinum, og vegnum kring tunnilin. Lógaruppskotið byggir á linjuna hjá tunnilsfelagnum, ið byrjar norðanfyri Skarvanes í Djúpadali, meðan alternativa linjan er tann, sum Landsverk mælti til í 2021. Henda byrjar norðanfyri Sands bygd.

Afturat sjálvum linjuføringunum hevur umrøðan eisini fevnt um, hvussu undirsjóvartunnilin skal byggjast. Millum annað hevur verið umrøtt, at tunnilin kann gerast skjótari og bíligari, um hann eisini verður gjørdur av Skúgvoynni. Vit viðmerkja bert stutt hendan partin, men vísa í størri mun á óvissur knýttar at val av linjuføring og kostnaðarmeting.

Tunnilsfelagið fekk til uppgávu at gera eina uttanveltaða lýsing og samanbering av linjunum til politiska myndugleikan at taka støðu til. Tunnilsfelagið valdi at brúka eina linju norðanfyri Sands bygd, har tunnilin byrjar norðanfyri Múlan. Hetta er ein linja, ið varð teknað fyri at spara byggilendi á Sandi, men byggilendi, sum verður spart, verður í uppskotinum hjá tunnilsfelagnum brúkt til at leggja ein veg. Um møguligt er at leggja ein veg í lendið, so er møguligt at leggja tunnilsmunnan longur suður, ið var upprunaliga uppskotið hjá Landsverki. Við at optimera linjuna kann hon styttast áleið 1,5 km, ið eisini minkar munandi um tunnils-kostnaðin. Í staðin fyri verða áleið 2 km av eyka vegi gjørdir norður móti Meginskúlanum.



Yviri við Strond 17// Postsmoga 78 // FO-110 Tórshavn // Tel. +298 340 800 // lv@lv.fo // www.landsverk.fo




Tunnilsfelagið vísir á, at orsøkin til, at tunnilslinjan er blivin 1,5 km longri úr Traðardali, er at hon mátti tillagast fyri at lúka reglur um brekkuhall og yvirhædd í tunlinum. Landsverk er ikki samt við hesi niðurstøðu. Brekkur verða máldar í prosentum, har hægri prosentir merkja brattari hall. Markið í tunlum er 5%. Hin reglan er, at tað skulu vera 50 m av gróti millum tunnil og havbotn.

Myndin omanfyri er ein samansett lýsing av tekningum úr notatinum hjá Norconsult "Alternative traseer for Suðuroyartunnilin" (ið er Fylgiskjal 28 í hoyringini hjá Løgmansskrivstovuni). Ovasta tekning (Figur 3-1 í frágreiðingini) vísir linjuna til Djúpadal, har brekkuhallið er á 5%. Hetta gevur ein styttri tunnil. Tekningin í miðjuni (Figur 4-1 í frágreiðingini) vísir linjuna til Traðardal, har brekkuhallið er 3%, sum førir til ein longri tunnil. Á niðastu tekningini eru tekningarnar samansettar, so brekkurnar kunnu samanberast. Her sæst hvussu nógv longri tunnilin verður, við at lækka hallið á brekkuni niður í 3%.

Tunnilsfelagið velur at gera ein tunnil gjøgnum Sandarlíð, og hevur hann við sum kostnað fyri báðar loysnirnar. Hetta setir Landsverk spurnateking við, tí tunnilin er bert neyðugur um Suðuroyartunnilin byrjar í Djúpadali. Landsverk hevur eina loysn at breiðka vegin gjøgnum Sandarlíð, ið er mett at verða nøktandi fyri ferðsluna til eystanbygdirnar. Loysnin varð gjørd klár til útboð í 2022, men arbeiðið varð steðgað, tá tunnilsfelagið tá boðaði frá, at tunnilslinjan skuldi broytast til Djúpadal. Vegabreiðkingin gjøgnum Sandarlíð varð tá mett at kosta millum 40 og 50 mió. kr.

Niðanfyri er ein rættað prísmeting og kostnað-nyttu kanning fyri linjuna til Traðardal samanborin við linjuna úr Djúpadali. Vit hava brúkt kostnaðin hjá tunnilsfelagnum til loysnina úr Djúpadali, og brúkt somu eindarprísir til loysnina úr Traðardali, har vit seta tunnilslongdina á 25 km við eini vegabreiðkan gjøgnum Sandarlíð.

| | Djúpidalur | Traðardalur | Munur | % |
|---|---|---|---|---|
| Suðuroyartunnilin | 3.683 | 4.038 | 355 | |
| Vegir og tunlar í Suðuroy | 408 | 408 | 0 | |
| Tunnilsvegur Sandoy | 112 | 22 | -90 | |
| Sandarlíð | 230 | 50 | -180 | |
| Tunnil Skúgvoy | 200 | 200 | 0 | |
| Trygdarrúm | 230 | 250 | 20 | |
| **Samlað** | **4.863** | **4.968** | **105** | **2%** |

Sum talvan vísir, er kostnaðurin millum loysnirnar lutfalsliga lítil. Munurin á 2% kann lættliga broytast við teimum óvissum, sum framvegis eru í verkætlanini, og eigur kostnaðarmunurin tí ikki at nýtast einsamalt sum grundarlag til støðutakan. Onnur atlit mugu eisini takast við, sum eitt nú at sleppa undan eyka ferðslu gjøgnum Sands bygd, at verja náttúruna í Djúpadali og at spara ferðatíð hjá suðuroyingum.

Kostnað-nyttu greiningar hjá Landsverki vísa, at linjan á Traðardal kann hava størri nyttu fyri samfelagsbúskapin enn linjan úr Djúpadali.

Munurin í byggikostnaði báðum talvunum kemst av at kostnað-nyttu kanningin tekur hædd fyri tíðarrentu í byggitíðini.

| Møguleiki | 1A Djúpidalur | 2A Traðardalur | Munur |
|---|---|---|---|
| | | | 1A - 2A |
| **Byggikostnaður:** | -4.814 | **-4.930** | 116 |
| Verklagskostnaður | -5.110 | -5.233 | 123 |
| Restvirði | 296 | 303 | -7 |
| **Rakstur og viðlíkahald:** | **-1.157** | **-1.061** | -96 |
| **Brúkaraágóði:** | **697** | **928** | -231 |
| Spard ferðatíð, fólk | 1.538 | 1.717 | -179 |
| Spard ferðatíð, farmur | 13 | 15 | -1 |
| Koyrikostnaður | -855 | -803 | -51 |
| **Uttanvirknaður:** | **288** | **294** | -5 |
| Ferðsluóhapp | -277 | -266 | -11 |
| Larmur | -49 | -47 | -2 |
| Luftdálking | 170 | 170 | 0 |
| Umhvørvið (CO2) | 250 | 250 | 0 |
| Avgjaldsavleiðing | 195 | 187 | 8 |
| **Eyka avleiðingar:** | **4.095** | **4.095** | 0 |
| Sparingar av verandi farleið | 3.843 | 3.843 | 0 |
| Avlýsingar av ferjum | 14 | 14 | 0 |
| Betran innan elektroniska infrakervi | 237 | 237 | 0 |
| **NNV** | **-892** | **-676** | -216 |
| IRR | 2,4% | 2,7% | |

Óvissur eru í kostnaðarmetingunum hjá tunnilsfelagnum. Landsverk hevur áður gjørt eina trýstroynd (Fylgiskjal 15 í lógaruppskotinum), ið bendir á, at kostnaðarmetingarnar eru ov lágar. Somu viðmerking hevur Kasper Nordmelan í Fylgiskjalið 32, har hann nevnir, at tunnilsfelagið ikki brúkar metodirnar rætt, og at kostnaðarmetingin tí tykist ov lágt sett.



Yviri við Strond 17// Postsmoga 78 // FO-110 Tórshavn // Tel. +298 340 800 // lv@lv.fo // www.landsverk.fo

Omanfyrinevnda kostnað-nytta tekur ikki atlit til útbyggingar á tilbúgvingarøkinum, ið kunnu ávirka kostnaðin.

Ein niðurstøða hjá tunnilsfelagnum er, at linjan úr Traðardali ikki ber til, uttan at bora verður úr Skúgvoy, tí hon verður ov long at útlufta. Landsverk loyvir sær at ivast í hesi niðurstøðu, tí linjan millum Sand og Skúgvoy er styttri enn hvat Nordconsult metir vera ráðiligt fyri at fáa nøktandi útlufting. Landsverk metir, at tað ber til at bora frá Sandi til Skúgvoyar, og útlufta restina av tunnilsgerðini haðani.

Loysnin við arbeiðsplássi á Skúgvoy er trupul at viðgera. Tað hava verið fleiri tilmæli gjørd, har ráðgevar hava víst á ymiskar loysnir, ið eiga at verða viðgjørdar nærri. Tað vantar eisini ein óheft lýsing av málinum.

## Myndugleikauppgávan er framvegis ógreið

Landsverk metir tað framvegis vera fleiri ivamál, ið ikki eru nóg væl lýst í fyriliggjandi lógaruppskotið.

Sum uppskotið er orðað, verður tunnilsfelagið vegamyndugleiki í tunlinum. Hetta merkir, at landið letur myndugleikauppgávuna frá sær til eitt partafelag, og hevur landið tí ikki eftirlitsmøguleika við eitt nú trygdini í tunlinum.

Sambært lógaruppskotinum verður uppgávan hjá Landsverki at góðkenna verkætlanirnar áðrenn útboð og aftaná, at tær eru lidnar. Tó er ógreitt hvussu hetta skal skiljast, tí tað skal gerast sambært góðkendum ætlanum. Lógaruppskotið viðmerkir fleiri viðurskifti, sum Landsverk metir eru partur av myndugleikaviðgerðini.

Góðkenningin skal vera undir ábyrgd mótvegis "landsstýrisfólkinum". Hetta eigur at verða greiðari ásett at meint verður við landsstýrisfólki í samferðslumálum, ið varðar av myndugleikauppgávuni.

Í almennu viðmerkingunum verður skrivað "*at Landsverk verður góðkenningarmyndugleiki, tá tað snýr seg um vegateknisk-ferðslufaklig og trygdar viðurskifti, og at verkætlanin skal góðkennast av Landsverk, áðrenn verkætlanin verður bjóðað út (s.11)*. Samstundis verður støða tikin til týðandi viðurskifti í tunlinum, sum eitt nú breidd, hall, íbinding til Skúgvoy og trygdarrúm, ið gera tað trupult hjá Landsverki at verða myndugleiki tí hesi kunnu ávirka tunnilstrygdina.

Um Landsverk metir, at loysnir sum eru nevndar í almennu viðmerkingum ikki eru nøktandi fyri eitt nú trygdina í tunlinum, eigur Landsverk at kunnu seta myndugleikakrøv til verkætlanina, hóast hesi víkja frá tekniskum lýsingum o.ø ásetingum í lógaruppskotinum við tilhoyrandi viðmerkingum og skjølum.

Landsverk mælir tí til at taka myndugleikauppgávuna sum heild upp til nærri viðgerð fyri at tryggja, hon liggur hjá tí almenna myndugleikanum og ikki hjá partafelagnum. Eisini mælir Landsverk til at viðurskifti viðvíkjandi trygd og myndugleikagóðkenning verða nærri lýst í mun til myndugleikauppgávuna.

Hóast Landsverk ikki er staðfestur myndugleiki í Suðuroyartunnlinum enn, er samskifta við tunnilsfelagið um, hvussu myndugleikauppgávan skal loysast, og hvørji krøv verða til tilfari v.m.. Landsverk fyrireikar í løtuni eina frágreiðing um myndugleikatilgongdina av Suðuroyartunnilin, ið verður latin tunnilsfelagnum og avvarðandi ráð, tá hon er liðug.

## Fyrireikingararbeiði sum vanta

Landsverk ger vart við, at fyrireikingarnar til verkætlanina ikki veita nóg gott grundarlag at taka støðu út frá.



Yviri við Strond 17// Postsmoga 78 // FO-110 Tórshavn // Tel. +298 340 800 // lv@lv.fo // www.landsverk.fo

*a) Jarðfrøðilig frágreiðingar*
Framvegis fyriliggur eingin nýggj jarðfrøðilig frágreiðing fyri verkætlanina, ið er ein av týdningarmestu kanningum fyri tunnilsgerðina. Verkætlanin byggir enn á innleiðandi kanningarnar frá 2021. Jarðfeingi eigur at gera sínar kanningar lidnar, áðrenn endalig støða verður tikin til verkætlanina.

Jarðfrøðin kring Sandarlíð Sandvík er ikki kannað, og kann geva avbjóðingar. Hetta er ein váði, ið eigur at vera kannaður nærri.

*b) Vegalinjur á Sandi*
Tunnilsfelagið vísir á, at linjuføringin á Sandi er sambært tekningum hjá Landsverki, men vísir Landsverk á at talan ikki um eina fullfíggjaða verkætlanin. Hesa hevur Landsverk, sannlíkt saman við kommunan í sambandi við útskiftingina í 1977, teknað sum eina alternativa vegalinju oman á havnina á Sandi. Henda linjan er fyri nógvum árum síðani slept og bygt er í økinum, m. a. bókasavnið.

*c) Trygd*
Ein nøktandi trygdarstrategi fyri verkætlanina vantar. Til dømis er enn ongin trygdarkanning gjørd fyri linjuføring við tunli til Skúgvoyar. Ein samlað trygdarkanning eigur at verða gjørd av óheftum ráðgeva, har ymiskar trygdarloysnir verða kannaðar. Trygdin kann hava ávirkan á val av linju, og eigur hon tí at verða staðfest, áðrenn farið verður víðari við verkætlanini.

Trygdarrúm eru ikki góðkend í Evropa sambært tunnils direktivinum frá 2024. Direktivið kom eftir stórar tunnilseldsbrunar um aldaskiftið, har tey vóru mett ótrygg og í summum førum minkaðu um samlaðu trygdina í tunlum.

Trygdarrúmini eiga tí at lýsast betri og vera í samsvari við eina yvirskipaða trygdarstrategi, ið verður gjørd av einum óheftum trygdarráðgeva.

Samanumtikið metir Landsverk at størri óvissur eru framvegis í fyriliggjandi tilfari, ið eiga at kannast nærri

.

Vinaliga

**Marjun Weihe Thomassen**
Stjóri



Yviri við Strond 17// Postsmoga 78 // FO-110 Tórshavn // Tel. +298 340 800 // lv@lv.fo // www.landsverk.fo